gult cyan magenta svart



## FISKIVINNUTÍÐINDI

## Dýrt verkfall

Verkfallið, sum nú verður aftur sett í verk í íslandi, nú lodnutíðin er av, verður mett at gerast sera dýrt fyri Ísland. Íslendskir myndugleikar rokna við, at verkfallið ger at kosta íslendska samfelagnum einar 1,5 milliardir norskar krónur, skrivar norska vevsíðan Intrafish.

– Verkfallið fer tó mest at ávirka fiskivinnuna á landi og sáttmálar, sum fiskavirkir hava gjørt við altjóða feløg koma at merkja hetta. Verkfallið er oyðileggjandi fyri íslendska samfelagið og fíggjarligi missurin verður ovurhondsstórur, segði íslendski fiskimálaráðharrin Arni Mathiesen í gjár.

## Fekk minulut í trolið

Herfyri fekk trolarin “Sæborg” úr Leirvík ein minulut í trolið. Trolarin fór á Klakksvík við lutinum og menn av marinustøðini komu norður at hyggja eftir honum. Luturin varð koyrdur í grótbrótið norðanfyri Bumshamar og síðan sprongdur i luftina. Alt hetta hendi uttan trupulleikar.

## Finnist at svium

Á fundinum í Norðurlandaráðnum í Oslo í hesum døgum um burðardygga vinnu í limalondunum, hevur Jørgen Niclasen, fiskivinnumálaráðharri fílst á sviar, tí hesir eru í móti føroyskum grindadrápi.

Jørgen Niclasen heldur tað vera mótsigandi at ynskja burðardygga vinnu og so ikki gera hetta á øllum økjum. Hann sigur, at føroyska grindaveiðan hóttir ikki nakran stovn, og er sostatt á burðardyggum støði

## Íslendingar borið við svartkjaft

Íslendski trolarin Hólmaborg SU hevur landað 2300 tons av svartkjafti, sum er fingið í íslendskum sjógvi. Hólmaborg hevur borið við svartkjaftin eystanfyri og hetta er vanliga tíðin, tá svartkjafturin plagar at koma í íslendskan sjógv, skrivar íslendska vevsíðan Interseafood.com

Íslendsku skipini hava roynt eftir svartkjafti vestanfyri Írland saman við øðrum skipum, men nú tekur svartkjafturin seg norðureftir og skjótt verður hann eisini at fáa í føroyskum sjógvi

## Nógv útlendsk skip undir Føroyum

Seinastu tveir mánaðarnar hava nógv útlendsk skip verið í føroyskum sjóøki. Talið hevur ligið millum 9-23, stendur í einum pressuskrivi, sum Færøernes Kommando hevur givið út. í dag vóru 21 útlendsk skip í føroyskum sjógi. Harav vóru 11 norskir línubátar, seks enskir trolarar og fýra franskir trolarar.

Flogfarið hjá donsku sjóverjuni undir Føroyum hevur seinastu tveir mánaðarnir ikki lagt merki til ólógligan fiskiskap í føroyskum sjógvi.

# Fiskaprísurin gevur okkum vónir

**– Ongin kann bygga nakað upp eftir bara einum góðum árið, men hevur tú fleiri samanhangandi ár við góðum fiskprísum og hampuligum fiskiskapi, so ber til. Hetta er júst tað vit hava upplivað seinastu árini og hetta gevur okkum dirvi at fara undir at skifta Kubatrolararnar út, sigur Olaf Olsen, reiðari á Beta.**

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*



*Tekningin sýnir nýggju kubatrolararnir sum helst fara at fáa felagsheitið baskaratrolararnir*

– Eg havi verið leingi í vinnuni sum reiðari og eg havi fylgt væl við. Eg haldi ikki at nakað nýbygningur sum er bygdur til feskfisk hevur borið seg, heilt síðan fiskimarkið varð flutt úr í 1977 og út frá hesum, so skuldu vit slett ikki havt skrivað undir byggisáttmála í Spania, sigur Olaf Olsen.

– Men støðan er broytt seinastu fýra árini. Prísurin hækkaði, rentan lækkaði og oljan var bílig, hóast hon er nú dýr aftur. Vit hava tó hugsað, at eitt gott ár til at rinda eitt skip yvir 15 ár, tað er ov lítið. Tí hava vit bíðað hesa góðu tíðina. Tað, sum hevur givið okkum dirvi er, at seinastu trý til fýra árini hevur fiskaprísurin stabiliserað seg, fiskiskapurin er ikki versnaður, rentan er ikki so galin, men oljan er dýr. Vit hava rikið ísfiskatrolarar í 20 ár, so vit kenna raksturin og hvørjar útreiðslur standast av hesum, sigur Olaf Olsen.

– Við tí fiskiskapi, sum er í dag, við teimum prísum sum eru í dag og við tí lága prísi, sum vit fáa okkara nýggju skip fyri, so er tað ikki heilt burturvið at fara undir hesa verkætlan. Tað at vit hava átta skip og royna at skifta tvey út fyrst, tað ger tað at vit ikki satsa 100 prosent. Vit gera ongan sáttmála um seks skip upp á ein gang, hvørki til fígging ella til bygging, sigur Olaf Olsen.

### Vøkstur steðgar

Búskaparligi vøksturin í vesturheiminum sum vit hava upplivað hann seinastu árini fer at steðga á og vit kunnu rokna við eini niðurgongd. Men hetta ræðir Beta, men tekur ikki dirvið frá teimum. Olaf Olsen:

– Sjálvandi órógvar búskapurin okkum. Men eg haldi og fleiri við mær, at fiskur er við at gerast ein so áhugaverd søluvøra, eisini, um vit hyggja burtur frá munn og kleyvsjúku og øðrum sum plágar kjøtídnaðin, at tað skal vera merkiligt, um prísurin á fiski í framtíðini fer at fella nógv, skuldi fiskaprísurin fallið nógv, so er tað sannlíkt, at annað fellir eisini, soleiðis at javnvág kemur í, sigur Olaf Olsen.

Olaf siggur, at ein annar faktorur sum spælir inn við ísfiski undir Føroyum er tann vitan teir hava fingið um fiskiskap undir Føroyum, síðan teir byrjaðu fyri góðum 20 árum síðan.

– Vit hava roynt við kubabátunum í 22 ár við sama fiskiskapi á somu leiðum. Vit hava havt átta skip og sera støðugt fólk, um hendan vitanin ikki kann hjálpa okkum, so kann alt gera tað sama, sigur Olaf Olsen.

– Eg havi eisini hugt eftir



*Olaf Olsen, reiðari*

hvørji brúkt skip, vit kundu fingið í staðin fyri okkara gomlu skip og tað er eisini eitt svart roknistykkið. Nógv skal gerast við eldri skip og tey eru verri at fíggja. Eitt gamalt skip, sum er nýggjari enn tey vit hava, tey kosta líka nógv í kapitalútreiðslum, sum eitt nýtt. Hetta er orsøkin til, at eg seinastu tíðina havi nýtt orkuna til at finna fram til, hvar kunnu vit byggja tað bíligasta ísfiskaskipið. Spania er í bíligara endanum, Kina upp aftur bíligari

# Negativ støða til nýggj skip

**- Eg skal ikki siga, at tað er ein almenn uppgáva at skunda undir endurnýggjan av fiskiflotanum, men eg haldi at tað almenna hevur ein negativan holdning til endurnýggjan av fiskiflotanum, sigur Jákup Sólstein, formaður í Føroya Reiðarafelag**

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Partafelagið Beta tók í seinastu stig til endurnýggjan av fiskiflotanum við at skriva undir byggisáttmála við eina spanska skipasmiðju um byggjan av einum pari, sum skal avloysa tríggjar av teimum átta kubatrolarunum. Føroya Banki fíggjar bæði skipini við 80 prosentum og restin er eginogn. Her eru also ongir almennir pengar upp í leikinum.

- Vit hava ein gamlan og niðurslitnan flota og tíðin er komin, at fáa nýggj skip til landið.Tíðirnar eru nógv broyttar seinastu árini og eg fari ikki at siga hart, at tað almenna skal upp í við peningi fyri fyri endurnýggja fiskiflotan. Men eg eftirlýsi ein meira positivan holdning frá almennari síðu til endurnýggjan av fiskiflotanum.

- Trupulleikin hjá flotanum er í dag, at gomlu skipini hava einki virði. Tað vil siga, at skulu menn byggja nýggj skip, so kunnu teir ikki rokna gamla vinnutólið sum eginogn. Teir mugu umframt at halda gamla skipið í brúkiligum standi, eisini eiga kontantar pengar til eginogn og tað eru harðar treytir. Tað vil siga, skal tú byggja nýtt skip, so má tú ikki skylda nakað í tí gamla og tú skal eiga kontantir, sigur Jákup Sólstein

- Tað eru bara nakrir heilt fáir djúpvatnstrolarar, sum hava nakað virði í dag, teir smærru hava einki søluvirði, sigur hann.

- Tá vit ikki fáa studning til endurnýggjan av fiskiflotanum í Føroyum, so fara vit aðrastaðni. Eitt nú trolararnir hjá Beta. Sponsku myndugleikarnir geva skipasmiðjuni studning. Trolararnir høvdu kanska blivið einar fimm milliónir dýrari at bygt í Norra ella í Føroyum og hesar fimm milliónirnar er beinleiðis spanskur studningur til føroysku fiskivinnuna, sigur Jákup Sólastein.

gult cyan magenta svart



## FISKIVINNUTÍÐINDI

## Gólvsølan 4. apríl

**Gott og væl 15 tons vórðu seld um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum mikudagin. Av hesum var nógv tann størsti parturin, knappliga 15 tons, toskur. Av yvirlitinum niðanfyri framgongur, hvørjir bátarnir vóru, sum seldu um uppboðssøluna, eins og samlaða býti av veiðuni var**

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 530 | Norðsøki | Lína | 1.405 |
| FD 553 | Brandur | Lína | 2.077 |
| FD 761 | Gunnvá | Snella | 236 |
| FD 981 | Másin | Snella | 62 |
| FD1054 | Aldubáran | Snella | 70 |
| FD1137 | Rivtangi | Snella | 363 |
| FD1142 | Durita | Snella | 97 |
| KG 323 | Turið | Lína | 959 |
| TG 177 | Conni | Snella | 170 |
| TG 26 | Majbritt | Snella | 305 |
| TG 300 | Líðarbrøður | | |
| | V/H. Joensen | Snella | 1.191 |
| TG 55 | Bláaberg | Snella | 180 |



| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| TG 797 | Norðfarið | Snella | 303 |
| VA 109 | Ella | Snella | 338 |
| VA 135 | Havfrúgvin | Snella | 416 |
| VA 164 | Niklái | Snella | 334 |
| VA 165 | Fríða | Snella | 546 |
| VA 221 | Carina | Snella | 174 |
| VA 28 | Álitið | Snella | 691 |
| VA 294 | Nestangi | Snella | 308 |
| VA 295 | Thova | Snella | 337 |
| VA 324 | Skarvur | Snella | 838 |
| VA 34 | Dunga Hans M/B | Snella | 503 |
| VA 350 | Sirið | Snella | 577 |
| VA 60 | Dáva Dánjal | Snella | 465 |
| VA 9 | Líðartangi | Snella | 145 |
| VN 125 | Ægir | Snella | 116 |
| VN 132 | Tordis M/B | Snella | 99 |
| VN 339 | Kollafjarða Hanus | Snella | 231 |
| VN 408 | Jónvør | Snella | 745 |
| VN 430 | Ruðitangi | Snella | 470 |
| VN 433 | Sjóløvan | Snella | 324 |
| VN 46 | Vesturroðin | Snella | 296 |

| Vorunavn | kilo |
|---|---|
| Brosma 3&4 | 5 |
| Hýsa 1 | 60 |
| Hýsa 2 | 138 |
| Hýsa 3 | 157 |
| Hýsa 4 | 23 |
| Havtaska 0 | 1 |
| Hvítingur 0 | 2 |
| Longa 0 | 4 |
| Longa 2 | 22 |
| Longa 4&5 | 8 |
| Reyðsprøka 0 | 12 |
| Steinbítur | 3 |
| Toskarogn | 70 |
| Toskur 1 | 136 |
| Toskur 2 | 947 |
| Toskur 3 | 5.941 |
| Toskur 4 | 6.440 |
| Toskur 5 | 1.329 |
| Upsi 0 | 73 |

# Sancy seld til Namibia

**Felag í Walvis Bay hevur keypt Sancy til at fiska hake í Suðuratlantshavi**

FISKIVINNA
*Eirikur Lindenskov*



Trolarin Sancy hjá Moyggjartúgvu í Vági er seldur til eitt felag í Walvis Bay í Namibia. Tað er skipsmeklaravirkið, Maretec á Argjum, sum hevur staðið fyri hesum handli.

Sancy var bygdur í Fraklandi í 1975 og er 43,50 x 9,48 m til støddar. Høvuðsmotorurin er ein 1800 HK Stork Werkspoor frá 1980, og skipið hevur 24 tons Rapp hátryst spøl.

Sancy fer helst avstað til Namibia í hesi vikuni, og væntast ferðin at taka einar fýra vikur.

Sjey mans eru komnir úr Walvis Bay, og ein føroyskur maskinmeistari verður við á túrinum til suðurenda Afrika

Nýggju eigararnir fara at fiska hake við trolaranum á djúpum vatni.

Fyri átta mánaðum síðani varð ferskfiskatrolarin Beinta eisini seld til Namibia.

Álvur Mortensen á Maretec sigur, at seinast teir frættu, kom gamla Beinta fullfermd av triðja túri á rað.

## Nýggjur skipari á Triton

Triton umboðar donsku sjóverjuna undir Føroyum í løtuni og skipari er Aage B. Jensen. Hann verður afloystur í dag av orlogskaptain Niels Larsen.

## Næstbesta lodnuveiðan nakrantíð

Lodnufisikiskapurin eftir vetrarlodnu í íslendskum sjógvu hevur roynst sera væl í ár, og teir hava nú veitt næstan 800.000 tons, tá eru tey 36.000 tonsini, sum føroyskir og grønlendskir nótabátar eisini íroknað, skrivar íslendska vevsíðan Interseafood.com.

Metárið er 1997, tá íslendingar veiddu 797.000 tons. 1963 er tó árið, har mest lodna er veidd í íslendskum sjógvi. Tá vóru veidd 830.000 tons og harav veiddu íslendingar 761.000 tons.

## Russi breyt beinið

MRCC Tórshavn veitti tann 23. mar hjálp til MRCC Clyde i Skotlandi, tí ein russi hevði brotið beinið umborð á russiska trolaranum “Marshall Krylov”, ið var staddur einar 300 fjórðingar vestur úr Írlandi. Tyrlan hjá donsku sjóverjuni í Føroyum flutti mannin av trolaranum og á eitt sjúkrahús í Galoway í Írlandi.

Eina viku seinni var aftur boð eftir donsku sjóverjutyrluni, tá ein maður hevði fingið skaða umborð á russiska trolaranum “Marshal Vasilevsky” einar 225 fjóðringar vestur úr Hebridunum. Maðurin var álvarsliga skaddur, hevði fingið opið kraniubrot.

Eitt bretskt Nimrod flogfar og eitt bretskt tangaflogfar hjálptu tyrlunu í báðum førum.

Tyrlan hevur seinastu tveir mánaðarnar flutt fýra sjúklingar av Suðuroyar Sjúkrahúsi og á landsjúkrahúsið.

## “Triton” kanna átta skip



Danska sjóverjuskipið Triton hevur seinastu tveir mánaðarnar kanna átta skip, harav fýra føroysk, eitt franskt og trý bretsk. Eitt av skipunum varð tikið, tað var bretski trolarin “Rivo 1” ið trolaði við ov smáum meskum eystanfyri Nólsoynna.

Tyrlan hjá sjóverjuni hevur seinastu tveir mánaðarnar flogið yvir teimum friðaðu økjunum undir Føroyum og hevur ikki lagt merki til ólógligan fiskiskap. Teir hava eisini flogið yvir Føroyabanka.